# Er forelskaði sjónleikarin bangin fyri at tapa?

**Finnur Jensen er maðurin aftan fyri lagið forelskaður sjónleikari, hann hevur somuleiðis skriva nógv av løgunum á fløguni Førist hjá Páll Finnur Páll, men nú fløgan er í uppskoti til eina Planet, fer Finnur til Suðuroyar**



*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Meðan restin av Páll Finnur Páll á Planet Awards leygarkvøldið spentir bíða eftir, um teirra fløga Førist vinnur Planetina fyri bestu útgávu, fara Finnur Jensen og gittarin hjá honum at undirhalda í Stóra Pakkhúsi í Vági .

– Eg vænti ikki, at vit vinna, og so er tað nógv stuttligari at spæla í Suðuroy enn at fara tómhentur heim í Havn, heldur 24 ára gamli havnarmaðurin skemtiliga fyri.

Á skránni leygarkvøldið eru føroyskir slagarar, útlendskir evergreens og egin løg. Finnur Jensen er ein av høvuðsmonnum í Páll Finnur Páll, hann skrivaði millum annað landapláguna "Forelskaður sjónleikari", ið er størtsa hittið í nýggjari tíð. Væntandi verða sjónleikarin og fleiri Páll Finnur Páll løg – bæði tey freku og tey fittu – eisini at hoyra í Pakkhúsinum, har áhoyrarar kunnu hugna sær við onkrum leskiligum afturvið tónleikinum.

Finnur Jensen, ið er annars er búsetandi í Århus, hevur verið sera virkin sum einstaklingur í barr- og café umhvørvinum í Havn. M.a. var hann í fyrstu finaluni í Singer Songwriter kappingini. Hetta verður fyrstu ferð, at hann fer einsamallur á pallin í Suðuroy.

Stóra Pakkhús letur leygarkvøldið upp klokkan 21 og er opið fram til 4 um morgunin.

# Konsertir við Channe Nussbaum Trio, Kára Sverrisson og Yggdrasil

**Í kvøld, í annað kvøld og leygarkvøldið verður høvið at hoyra forvitnisligan fusións fólkatónleik og klezmer tónleik frá donsku Channe Nussbaum Trio og heimstónleik frá Kára Sverrissyni og Yggdrasil. Tey luttaka saman á fyrstu FO-DK konsertferðini í ár**

TÍÐINDASKRIV

Channe Nussbaum hevur við trimum róstum fløguútgávum og einari nýggjari fløguútgávu á gáttini víst seg sum tann fremsti úrmælingurin innan klezmer tónleik í Danmark. Á konsertferðini í Føroyum fer hon at spæla nýggjan fusións fólkatónleik á donskum, har balkan tónleikur, klezmer salsa og danskur vísupoppur ganga upp í eina hægri eind. Harumframt fer hon at spæla vanligan klezmer tónleik á jiddiskum. ´

Kári Sverrisson og Yggdrasil spæla heimstónleik við uppruna í føroyskum fólkatónleiki. Yggdrasil hevur í ár 25 ár á baki, og Kári Sverrisson hevur í fleiri av hesum árunum luttikið á konsertferðum saman við bólkinum kring heimin.

Channe Nussbaum Trio, Kári Sverrisson og Yggdrasil fara at hava tríggjar konsertir saman í Føroyum:

– Hóskvøldið 26. januar, Atlantis, Klaksvík, kl. 19.00.

– Fríggjakvøldið 27. januar, Mentanarhúsið í Fuglafirði, kl. 21.00.

– Leygarkvøldið 28. januar, á Planet Awards á Hotel Föroyum, kl. 21.00-04.00.

FO-DK Konsertferðirnar eru fyriskipaðar av Norðurlandahúsinum, FUT, og donsku feløgunum DJBFA og Dansk Artistforbund. Konsertferðirnar eru stuðlaðar av Atlantic Airways.






ÚTSØLAN

byrjar leygardagin 28. februar kl. 09.00
Opið er til kl. 17.00

Fríggjadagin er stongt!

EURO SKO Pf. FÓTBÚNI TRÓNDARGØTA 23 · TLF. 311705 EURO SKO